GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Skjót levering
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
www.danstein.fo



Føroya størsta úrval av
PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

...sjálvandi til besta prísin!!

FARPACK
Staravegur 5, P.O. Box 171
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com




JÄSPI KETLAR
Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu
Bæði dupultir og einkultir
Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.
- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum
MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000



GÓÐKENDUR
RÓTTANGI
úr glasfipuri

FØROYSK FRAMLEIÐSLA
Prísur 6.500,-

ALUMINIUM & PLASTVIRKIÐ P/F
www.plastvirki.fo
Umsiting:
Tel 31 87 96
Fax 31 87 46
Í Svanga 23
Postboks 199
FO-110 Tórshavn
e-mail: plastvirki@plastvirki.fo
Verkstaður:
Norðagøta



Bahá'í samfelagið í Tórshavn
Miðstøðin í Gundadali
Opið hvørt fríggjakvøld.
Samkoma kl. 20

»Hyggur tú at rættvísi, vel tú øðrum tað, ið tú velur tær sjálvum. Sanniliga, við eyðmýkt verður menniskjað upphevjað til himmal máttarins, og hinvegin lækkar erpni hann til tað lægsta eyðmýktar- og mannminkanarstøðið«
Bahá'i skriftir
www.bci.org/bahai.fo



BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666



Skorsteins-sóparin
er við til at halda umhvørvið reint
Jimex Brenniovnar
Isokern Skorsteinsbjálving
Isokern Skorsteinselementir
Lúkur - Fuglaristir
Ventilar - Roykhattar
Andrass á Krossbrekku
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass



DAGFØR TEG
Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum
HALT SOSIALIN

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin
*ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.



Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 4. mai 2000, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54, grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Alistøðina hjá P/F Polarlaks í Hvannasundi**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Debesartrøð, 100 Tórshavn, innan 4 vikur frá dags dato.

Heilsufrøðiliga starvsstovan



ARBEIÐSKLÆÐIR • MÁLING
SJÓKLÆÐIR 66° n • BÚNÝTI
*Handilin er fullur av nýheimkomnari vøru*
AMBOÐ & BÚNÝTI
v/J. H. Joensen
Miðvágur • Tel. 333555 • Fax 333851
Sosialurin - 311820




# HYGG & HOYR

**Fríggjadagur 12. mai**

## Náttaravnarnir

### Tað skjótt farna náttarravnaárið

Neil Joensen



Nú er komi væl ímóti sumrið og náttarravnarnir fara at leggja seg fyri summarið. Hetta árið hevur verið sum øll onnur ár, nokk av sendingum, brøvum og nokk av ringjarum . Sendingin koyrir javnt alt árið runt, men tá ið tað fer at lýsna um næturnar, og kvøldini verða ljósari minkar talið av lurtarum eitt sindur, men ikki at tað skaðar sendingina nakað.

**Meira undirtøka?**

Sum sagt koyrir sendingin eftir einum meira javnum banað, men innsendingin er broytt rættuliga nógv. Í fyrstani vóru brøv send inn hondskrivað og faxa, ikki tað at tey ikki verða tað enn, men nú liggur innsendingin um 90% av teldubrøvum ( e-mail ). Internetið er vaksið nógv tey síðstu árini, og næstan øll hava tað. Men tað eru enn tey 10% eftir sum hondskrivað ella faxa brøvini.

**Endin**

Ætlanin er ikki at støðga sendingina heilt enn. Ársins songrødd er júst byrjað, og ætlanin er hjá náttaravnunum at fylgja við henni, sum gevur eisini lurtaranum møguleika at fylgja við henni í sendingini. Og enn er vinningurin eftir at burturluta. Vinningurin frá Alantic Airways er ferð pg atgongurmerki til konsert hjá Tinu Turner. Men tó eru teir ikki heilt sikrir í hvat teir skulu enda við. Ikki vilja teir siga nakað teir ikki eru sikrir í, og um so, so var spenningurin ikki har meira. Men tað var fingið so mikið burtúr teimum at teir enda við ein Brakið.

# ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

## Á staðnum røttu tíðina



Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, skrivar

Loftmiðlar eiga sum pressa at vera á røttum staði til røttu tíðina, so at boðskapurin kennist aktuellur og hugtekur fólk, og tað haldi eg, at bæði útvørp og sjónvarpið royna at gera eftir førimuni, hóast mong ilskast og halda loftmiðlarnar ikki vera lisensgjøldini verdar. Tilsamans kr. 3.000 árliga í lisensi kann tykjast nógv at lata hjá einum húsarhaldi, serliga hjá t.d. støkum pensionistum, men harra gud, tað er undir 10 kr. um dagin svarandi til eina fræga øl, triðings sigarettpakka, ein lítlan bommpakka ella fimtings biografbilett o.s.fr.

Og afturfyri fæst hvønn dag vanliga ein frægur filmur, dagsaktuell kunning, undirhald og ymisk dagdvølja umframt ymist andaliga mennandi.

Hinvegin skerst ikki burtur, at tvinnar útvarpsrásir framvegis eru ókeypis og partar av báðum als ikki so galnir, so í veruleikanum eiga fólk ikki at láta so illa at, men at fegnast, vraka og velja.

Báðir teir almennu loftmiðlarnir hava t.d. lýst seinastu sjálvstýrissamráðingarnar væl og virðiliga. Breddin í kvøld um Biskupstøð og útjaðaran var spillfeskur og frálíkur.

Og fyri at taka okkurt annað ítøkiligt fram, so vil eg nevna eitt nú egnu framleiddu páskasendingar sjónvarpsins.

Tað var meðan sjónvarpsumboð frammanundan vóru og ferðaðust í Miðalhavinum, og hóast steðgað varð bert heilt fáar tímar í tí heilaga landinum, so spurdist burtur úr ein sera tignarlig páskasending, har vit vórðu kunnað og víst runt til ymisk heilag støð, sum tey flestu bert hava hoyrt um í páskaboðskapinum.

At okkara umboðskvinna í Ísrael, Hanna hjá Essa og Lydiu, var ferðaleiðari, gjørdi bert sendingina enn meira viðkomandi og sannførandi. Sera væl frágingið frá øllum pørtum og ikki minst myndatakaranum, sum ta ferðina var Bjarnheðin í Hoyvík.

Zacharis skal eiga tað, at hann er ein knassi at vera á blettinum røttu løtuna, so at tað nógva, sum hann millum ár og dag fær frá hondini, hugtekur mangar síggjarar. Hann hevur bara nøs fyri hasum, umframt frálíkt hegni at koma í samband við fólk.

Nakað tað sama kann sigast um follow-upp sending hansara um eggjaræning í Skúvoy. Loftmiðlasendingar eru annars vanliga ov ofta bara frágreiðandi og verða slíkar alt ov sjáldan eftirviðgjørdar við aftanákjaki ella problematiseraðar.

Tann frálíka annars gamla upprunasendingin úr Skúvoy fekk sostatt nýtt viðkomandi perspektiv, av at fáa aktuelt orðaskifti í lag við Tummas Frank og Ólav Skipagøtu um avleiðingarnar av nýggju fuglaveiðilógini fyri eitt nú fólkið sjálvt á fuglaplássum sum úti í Skúvoy.

At hugsa sær til, at skúvoyingar frá náttúrunar hond nú á døgum í veruleikanum hava verri møguleikar fyri at ogna sær ein lomviga í pottin enn tann fastlønti leygardagsfiskarin á kyrruplássum á massdrápsferð í rasarabáti, ílatin armyklæði og við fleiri pumpguns innanborða! Tað man lítið annað vera at gera hjá skúvoyarfólki enn at fáa Ólav, útiseta teirra í Hoyvík, at fara oman í Vágsbotn á marked har at keypa teimum eina lomvigakneppu at senda suður, so tey ikki heilt skulu gloyma rákan av lomviga.

Annars hava høvuðstíðindini farnu vikuna verið um hetta ólukku amorøsa telduvirussi, sum nærum hevur kollrent alla ta siviliseraðu verðina, bara tí at onkur snildur kúllur hevur spælt hund við hesum amboði, sum vit øll siviliseraðu hava gjørt okkum so bundin av, at vit heilt hava gloymt kynstrið at hugsa og virka sjálv.

Ongin ivi um, at elda, eins og t.d. eldur, krút, bilar og annað gott, er frálíka hent og mannaættini ein veldug medhjálp, um tað verður væl og skynsamt umsitið, men aftur her er tað menniskjað sjálvt, sum er slangan í paradísinum. Teldumedaljan hevur sum eldur og krút eina baksíðu, menniskjað sjálvt, og tað er helst ilt at vara seg fyri.

At enda hava tað í øllum loftmiðlum seinastu tíðina verið nógvar endursendingar, men tá tær yvirhøvur hava verið góðar og viðkomandi, samstundis sum fólk víða hvar illa klára at fáa alt við um eina leið, so er eisini tað bara heilt í lagi.

Samanumtikið er ivaleyst fyri bæði eygu og oyru, og tað hevði onki verið forgjørt í at stytt loftmiðlaskráirnar munandi eina tíð, nú tað av álvara sumrar, og fólk, sum eru før fyri tí, heldur áttu at leita sær sum mest út fyri dyr.

ÚTsjón Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN